

www.oljan.fo

**Jan Müller** 22 - 12 - 2011

# Seadrill stórar ætlanir í Brasil

Norska felagið Seadrill ætlar sær at fáa betri fótafesti í brasilsku frálandavinnuni. Ætlanin er at økja tænastuútboðið, og í hesum sambandi tingast felagið við SapuraCrest Petroleum Bhd. um møguligt íløgusamstarv. SapuraCrest gjørdi fyri stuttum sáttmálar við brasilska oljufelagið Petrobras um at leiga felagnum trý rørleggingarskip, sum eru í gerð, og sum Petrobras skal leiga í fimm ár. Eitt av skipunum verður bygt í Brasil eftir kravi haðani, og hini bæði verða bygd aðrastaðni. Eftir ætlanini skulu tey trý skipini fara í vinnu fyri Petrobras í oktober í 2014, og Seadrill skal eiga helmingin av feløgunum, sum gera leigusáttmálarnar við brasilska oljufelagið.